

Ben Arabo, stjóri á Atlantic Petroleum. Mynd: Jógvan H. Gardar

# Framtíðin skal avgerast áðrenn jólahalguna

**Jógvan Hugo Gardar**

17.12.2015 - 18:29

Oljan.fo

Atlantic Petroleum hevur boða frá at arbeitt vervur við at finna eina loysn fyri felagið, og arbeitt verður við at finna út av um felagið skal ella kann halda fram. Oljuprísurin hevur áhaldandi verið lágur í meir enn eitt ár. og í løtuni liggur prísurin eini 20-30 dollarar undir tí sum føroyska oljufelagið má hava fyri at íløgurnar skulu bera seg.

Kreppan í kanadiska olju- og gassfelagnum Iona Energy rakar á einhvønn hátt Atlantic Petroleum, tí føroyska felagið samstarvar við Iona Energy um Orlando-útbyggingina.

Iona Energy boðaði í november frá at ein roynd at fáa bjarga felagnum fíggjarliga er miseydnað. Orsøkin er at ein sokallað "farm out"-avtalað í samband við ognarskapin í Orlando-ætlanini miseydnaðist.

Iona Energy hevur tí boða frá at teirra bretsku dótturfeløg Iona Energy Company og Iona UK Huntington Limited eftir øllum at døma noyðast at leggja kortini á borðið, og senda feløgini í skiftirættin.

Tað er hetta arbeiði sum nú nærkast eini avkláring, sum eisini fær avleiðingar, so ella so, fyri hvussu Atlantic Petroleum kann fara inn í 2016.

Í einum boðum til keypsskálan í dag hevur Atlantic Petroleum boða frá at tey í næstu viku fara at kunngera, um felagnum er lív lagað, ella um tað fer undir umsiting ella skal endurskipast.

Oljuprísurin saman við trupulleikunum á Orlando-útbyggingini benda á at ein umskipan ella umsiting eru tær loysnirnar sum ligga nærmast í løtuni.